# Altjóða arkitekturadagur í Føroyum

ARKITEKTURADAGUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

9. oktober er altjóða arkitekturardagur. Her í Føroyum verður hesin dagur hildin á fyrsta sinni.

Arkitekturardagurin er eitt tiltak, sum UIA, ein altjóða felagsskapur fyri arkitektar, setti í verk í 1985. Dagurin hevur síðan verið hildin um allan heim á hvørjum árið.

Í ár er ælanin á fyrsta sinni at halda arkitekturardag í Føroyum.

- Tað er okkara ætlan, at hetta verður ein byrjan til eitt afturvendandi tiltak, á hvørjum árið, har arkitekturin verður í focus, sigur Heidi H. Poulsen, arkitektur, sum er ein av fyrireikarunum.

Altjóða yvirlýsingin hjá UIA fyri arkitekturardegnum í ár er: »architects energy versus global crisis«.

Hjá okkum eitur yvirlýsingin »Burðardygd, siðvenja og tøkni«.

- Á arkitekturardegnum ynskja vit at vísa á nýggja føroyska byggilist og hvussu føroyskir arkitektar fyrihalda seg til hugtakið burðardygd. Byggilistin er týðandi partur í samfelagsmenningini, hon tulkar tíð og stað, vísir á nýggj hugarák og nýggja tøkni. Samstundis eru vit tilvitað um at varðveita okkara mentunararv, sigur Heidi H. Poulsen.

Ein fotoframsýning, »Arkitektur–við–merking«, í Listaglugganum í Dr. Jakobsensgøtu í Havn.

Arkitekturframsýnining, har føroysk arkitektavirkið vísa fram verkætlanir verður í Reinsarínum í Havn.

Framsýning av arbeiði hjá børnum, har verkevni er at eygleiða, skjalfesta og viðmerkja. Framsýningarstaður verður lýstur seinni.

Landsverk hevur opið hús. Í matarhølinum hjá Landsverki, við Sverrisgøtu, verður framsýning við bæði aktuellum og søguligum verkætlanum hjá Landsverki.

Jarðfeingi luttekur eisini við eini framsýning. Lýst verður seinni, hvar framsýningin verður, og hvat hon fevnir um.

Sjónvarpið fer í bandasavnið og leitar fram egnar sendingar um arkitektur. Hesar sendingar verða vístar í viku 41.

Útvarpið verður eisini við, og fer Gunnar Nolsøe at taka serligan tátt upp.

Í Dimmalætting og Sosialinum verða ymsar greinarøð um arkitektur í døgunum frá mánadag til fríggjadag í næstu viku.



*Arbeiðsfólk í Hoyvíkar kirkju, tá hon varð reist fyri trimum árum síðani*

